# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Jógvan Martin verður víkingur

**Fyrrverandi landsliðsvenjarin fer nú at hava ábyrgdina av Víkingi, sum sunnudagin – við Antoni Skoradal við róðrið – skal til Sands**

B71-VÍKINGUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Seinnapartin í dag verður kunngjørt, at Jógvan Martin Olsen næsta ár fer at venja Víking*

Eg fari at venja eitt lið í Formula deildini næsta kappingarár, og tað verður kunngjørt fyrsta dagin, hvat lið talan er um, segði Jógvan Martin Olsen, tá ið hann í vikuni var á síðstu uttanlands ferðini saman við landsliðnum.

Landsliðið lendi aftur í Føroyum í gjárkvøldið, og í dag klokkan 17 skipar Víkingur fyri kunningarfundi í ítróttarhúsinum í Leirvík. Á skránni er, at høvuðsvenjarin komandi kappingarár avdúkaður, og víkingafjepparar, fjølmiðlar og áhugað annars eru vælkomin, verður sagt á heimasíðuni hjá Víkingi.

Tey, sum seinnapartin fara til Leirvíkar, fara at fáa at vita, at tað verður Jógvan Martin Olsen, sum nú fer at verða venjari hjá Víkingi.

Nú fyrrverandi landsliðsvenjarin hevur áður havt ábyrgdina av einum liði í bestu deildini. Tað var NSÍ, sum hann í 2002 vann steypakappingina og silvurkrónur í landskappingini saman við.

### Við Antoni til Sands

Í ár hevur gøtumaðurin Anton Skoradal havt ábyrgdina av Víkinga liðnum. Tað er nakað síðani, at Anton boðaði frá, at hann næsta ár ikki fer at vera venjari í fremstu røð.

Men Anton fer at hava ábyrgdina, tá ið Víkingur sunnudagin fyri síðstu ferð í ár fer at spæla á útivølli. Víkingur fer til Sands, og hóast møguleikin fyri heiðursmerkjum og altjóða luttøku er burtur, so hava víkingarnir týdningarmikla fimta plássið at spæla um.

Víkingur er tvey stig framman fyri B68, og eydnast tað at halda toftamenn aftanfyri seg, so fer tað at bera við sær, at Jógvan Martin Olsen og Víkingur næsta kappingarár fara at spæla eina ferð meiri á heimavølli enn B68 og tey, sum eru longri niðri á støðutalvuni.

Álopsspælarin Andreas Lava Olsen noyddist orsaka av skaða at geva avboð til teir báðar landsliðdystirnar, sum hava verið seinastu vikuna. Tað er ivasamt, um hann verður førur fyri at spæla á Sandi.

### Sperdir sandoyingar

B71 fer at spæla fyri lívinum í bestu deildini. Sandoyingar eru fimm stig aftan fyri KÍ. Hvussu tað fer at hilnast hjá klaksvíkingum í tveimum teimum síðstu umførunum er ikki upp til teir í B71 at gera av.

Tað, sum B71 hevur møguleika at ávirka, eru dysturin á heimavølli ímóti Víkingi og so í Fuglafirði leygardagin um eina viku. Higartil í ár hava sandoyingar vunnið seks dystir – 3-1 og 1-0 á Skála, 2-0 á KÍ og 2-1 á ÍF á heimavølli, og 1-0 ímóti Skála og 3-0 ímóti B68 á útivølli.

Víkingur vitjaði á Sandi 28. mai, og ta ferðina endaði tað við stórsigri til gestirnar, sum fóru norður um aftur við 5-0 sigri í viðførinum. Um víkingarnir hesa ferð fara av Sandi við í minsta lagi einum stigi, so verður tað greitt, at B71 næsta sunnudag skal spæla í næstbestu deildini.

Hvørki í B71 ella Víkingi hava venjingarnar seinastu vikuna verið órógvaðar av, at spælarar úr feløgunum hava verið á landsliðsferð saman við Jógvani Martin Olsen – nýggja venjaranum hjá Víkingi.w

## Formuladeildin

***Sunnudagin***
**HB-B36: Eiler Rasmussen**
**Skála-EB/Streymur: Dagfinn Olsen**
**KÍ-NSÍ: Petur Reinert**
**B71-Víkingur: Lars Müller**
**B68-ÍF: Georg Rasmusen**

## 1. deild

***Leygardagin***
**AB-KÍ: Bárður Mortensen**
**TB-HB: Páll Augustinussen**
**07 Vestur-NSÍ: Høgni Hansen**
**Víkingur-VB/Sumba: Alex Troleis**
**EB/Streymur-B68: Andrew Christiansen**

| Formuladeildin | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| EB/Streymur | 25 | 16 | 3 | 6 | 51-32 | 51 |
| HB | 25 | 13 | 6 | 6 | 54-22 | 45 |
| B36 | 25 | 13 | 6 | 6 | 32-21 | 45 |
| NSÍ | 25 | 12 | 5 | 8 | 38-33 | 41 |
| Víkingur | 25 | 11 | 5 | 9 | 42-33 | 38 |
| B68 | 25 | 11 | 3 | 11 | 23-35 | 36 |
| KÍ | 25 | 7 | 6 | 12 | 31-38 | 27 |
| ÍF | 25 | 8 | 3 | 14 | 31-46 | 27 |
| B71 | 25 | 6 | 4 | 15 | 26-46 | 22 |
| Skála | 25 | 4 | 7 | 14 | 21-43 | 19 |

| 1. deild | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 07 Vestur | 25 | 19 | 2 | 4 | 103-32 | 59 |
| AB | 25 | 19 | 1 | 5 | 88-31 | 58 |
| VB/Sumba | 25 | 18 | 2 | 5 | 59-25 | 56 |
| TB | 25 | 16 | 3 | 6 | 61-21 | 51 |
| Víkingur | 25 | 8 | 3 | 14 | 32-70 | 27 |
| B68 | 25 | 7 | 3 | 15 | 47-61 | 24 |
| NSÍ | 25 | 6 | 5 | 14 | 45-67 | 23 |
| HB | 25 | 5 | 8 | 12 | 29-51 | 23 |
| KÍ | 25 | 5 | 4 | 16 | 33-79 | 19 |
| EB/Streymur | 25 | 6 | 1 | 18 | 25-85 | 19 |

# NSÍ spælir fyri at vinna silvur

**Um tað skal eydnast meistarunum at enda næstovastir, so fer KÍ hesa ferð ikki sjálvt at tryggja sær plássið í bestu deildini**

KÍ-NSÍ
*Jákup Mørk*

Fer tað at eydnast KÍ at tryggja sær plássið í bestu deildini, ella fer tað at eydnast meistarunum – í hvussu so er inntil sunnudagin – í NSÍ at halda tørn í kappingini um næstfremsta plássið og harvið silvurkrónurnar.

Hetta eru spurningarnir undan NSÍ vitjanini í Klaksvík. Klaksvíkingar hava higartil í ár staðið seg betri ímóti NSÍ, enn støðutalvan kundi borið boð um, at teir skuldu havt gjørt. Í 9. umfari endaði tað 1-1, tá ið NSÍ vitjaði í Klaksvík. Í 17. umfari vann KÍ 4-2 í Runavík. Tað var ikki minst hetta óvæntaða tapið, sum vísti seg at kosta NSÍ møguleikan at endurvinna FM heitið.

- Nú spæla vit fyri at vinna silvurmerkini. Tí fara vit til Klaksvíkar fyri at vinna øll stigini, sigur Hjalgrím Elttør, klaksvíkingurin sum hesi bæði seinastu árini hevur verið við til at seta dám á í Runavík.

Allir NSÍ spælararnir eru tøkir uttan Aco Pandurovic, sum hevur sæð gult fimm ferðir og tískil er leikbannaður. Einar Hansen, sum seinastu ferðirnar hevur sitið uttanfyri, er gott boð upp á vinstra vongverja.

Meðan NSÍ framvegis hevur møguleika at vinna heiðursmerkir, so hugsa tey í Klaksvík um at sleppa undan hóttanini av niðurflyting. Um tað eydnast at vinna eitt stig hesa ferð, so verða klaksvíkingar komnir undan hóttanini.

Allir KÍ spælararnir eru tøkir, og tað frættist úr Klaksvík, at tað hevur verið høgur intensitetur í venjingunum.

Hjá NSÍ hava Jónas Þór Næs, Bogi Løkin og Jóhan Troest Davidsen verið burturi í landsliðsørindum. Hjá KÍ hava Rógvi Jacobsen og Jákup Mikkelsen tvær tær seinastu vikurnar verið á sama liði sum teir báðir í NSÍ. Nú fara teir at standa andlit til andlit og báðir partar hava nógv at spæla fyri.